HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Vágs kommuna
Postrúm 29
FO-910 Vágur

Tórshavn, hin 30. mars 2006
Málnr.: 6110-200500973-15
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: SP / Tlf.: 35 64 24

**Umhvørvisdeildin**

# Loyvi til aftursøkking

## 1 Loyvi og heimild

Sambært grein 2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, veitir Heilsufrøðiliga starvsstovan við hesum loyvi til at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp av botni í sambandi við røkt av dýpi við Vágs havn.

Tilfarið kann aftursøkkjast uttan fyri Vágsfjørð, á umleið 61° 28,0' N og 06° 41,1' W, sum víst á hjálagda korti.

## 2 Umsóknin

Hin 6. desember 2005 fekk Heilsufrøðiliga starvsstovan umsókn frá Vágs kommunu um loyvi at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp í sambandi við røkt av dýpi við Vágs havn. Samlaða nøgdin, sum verður tikin upp er mett til uml. 12.500 $m^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið uttan fyri Vágsfjørð á 61° 28,0' N og 06° 41,1' W.

## 3 Ummæli

Sambært grein 5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunu til ummælis.

Hin 14. desember 2005 varð umsóknin send Fiskimálaráðnum, Landsverki og Vágs kommunu til ummælis.

Í skrivi frá Vágs kommunu dagfest 19. desember 2005 verður sagt frá, at kommunan viðmælir umsóknini.

Í skrivi dagfest 20. desember 2005 verður sagt frá, at Landsverk einki hevur at viðmerkja.

Í skrivi frá Fiskimálaráðnum, dagfest 3. januar 2006, verður sagt, at umsóknin hevur verið til ummælis hjá Fiskirannsóknarstovuni, Skipaeftirlitinum og Fiskiveiðieftirlitinum.

Skipaeftirlitið heitir á avvarðandi myndugleika um at rætta sjókort og siglingarbøkur í samsvar við nýggju upplýsingarnar, men hevur annars ongar viðmerkingar.

Fiskirannsóknarstovan kann viðmæla at aftursøkkingin verður loyvd.

Fiskiveiðieftirlitið hevur ongar viðmerkingar.

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. **+298 356 400**
Fax. **+298 356 401**
E-mail: hfs@hfs.fo
Homepage: http:\\www.hfs.fo

# 4 Kanningar av botntilfarinum

Eftir umbøn frá Heilsufrøðiligu starvsstovuni eru sýni tikin av botntilfarinum. Sýnini eru kannað fyri tungmetalini Hg, Cd, Pb, Cu, Zn, umframt PAH og PCB.

Úrslit av kanningunum:

| Evni | Cd | Cu | Hg | Pb | Zn | ΣPCB 7 | Σ16 PAH |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| mg/kg TE | 0,30 | 177 | 0,27 | 0,36 | 240 | 0,02 | 4,08 |

Sambært kriterium hjá og SFT[1] eru virðini fyri Cd, Hg, Pb og Zn flokkað sum lítið dálkað. Virðini fyri Cu (kopar), PCB og PCB (oljuevni) eru flokkað sum týðiliga dálkað. Tó ikki meiri enn so, at søkking verður mett ráðilig.

Heilsufrøðiliga starvsstovan metir tí, at tilfarið kann aftursøkkjast uttan vanda fyri týðandi dálking. Vegleiðingar og kriteriu frá OSPAR[2] og MST[3] eru eisini nýttar í metingini.

Tað er av stórum týdningi, at dálking verður avmarkað mest møguligt, og hevur kommunan ábyrgd av, at spillivatnsútleiðingar verða reinsaðar og førdar út á sjógv, har upphópan ikki fer fram.

# 5 Avgerð

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið avgerð um at loyva søkkingini uttan fyri Vágsfjørð, á uml. 45 metra dýpi, á knattstøðu 61° 28,0’ N og 06° 41,1’ W, sum víst á hjálagda korti.

Avgerðin er grundað á tilmælini í málinum og egnar metingar.

Av tí at tilfarið, sum skal søkkjast er nakað dálkað, verður heitt á kommuna um at gera eina frágreiðing spillivatnsútleiðingar á økinum og um hvørjar ætlanir kommunan hevur í sambandi við spillivatnsútleiðingar. Frágreiðingin skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna saman við frágreiðingini um søkkingina sambært grein 5.1.5.

## 5.1 Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

[1] Statens Forurensningstilsyn í Noregi
[2] OSPAR Commision for the Protection of the Marine Environment og the North-East Atlantic
[3] Miljøstyrelsen í Danmark

5.1.1 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin sambært grein 8 er úti.

5.1.2 Heilsufrøðiliga starvsstovan skal í seinasta lagi átta dagar frammanundan hava boð um nær arbeiðið byrjar. Eisini skal boðast frá, beint eftir at arbeiðið er liðugt.

5.1.3 Um gjørligt skal mest møguligt av tilfarinum nýtast til uppfylling ella annað, so at minst møguligt verður aftursøkt.

5.1.4 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

5.1.5 Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast saman við tíðarskeiði, knattstøðu, dýpi og hvaðani tilfarið er tikið. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni um hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr., umframt frágreiðing um spillivatnsútleiðingar.

5.1.6 Er arbeiðið ikki gjørt eitt ár aftan á at loyvið er givið, fellur loyvið burtur.

# 6 Eftirlit

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Vágs kommuna skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann útinna eftirlitið.

# 7 Gjald

Vágs kommuna skal, sambært kunngerð nr. 31 frá 8. mars 2001 *um gjøld eftir havumhvørvislógini*, rinda fyri ta viðgerð, Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

# 8 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært grein 10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, *um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum*, kærast til landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum saman við neyðugum skjølum, sendir hana til landsstýrismannin.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Aftursøkkingarstað uttan fyri Vágsfjørð**

